# Nýggj kvinna á fólkaflokslistanum

**Fólkaflokkurin hevur nú boðað frá, hvørji verða valevni floksins til fólkatingsvalið. Hjørdis Viberg av Toftum er nýggja navnið á listanum**

UPPSTILLING
*Jákup Mørk*

Tað verða ikki óvæntað Anfinn Kallsberg og Óli Breckman, sum verða frontifigurarnir, nú Fólkaflokkurin hevur gjørt seg út til valstríðið.

Mikudagin seinnapart boðaði flokkurin frá, hvørjar persónar tey hava sett á valevnislistan, og lítið er at ivast í, at hetta tykist vera ein sterkur listi.

Millum tey 21 nøvnini finnast millum annað samlaða ting- og landsstýrismanning floksins, og hartil er talan eisini um onnur valevni, sum vanliga fáa sínar føstu atkvøður. Eitt nú Bjarti Mohr, Ingi Olsen og Annika Olsen.

Tað er tó framvegis lítið at ivast í, at tað fyrst og fremst eru Anfinn Kallsberg og Óli Breckman, sum skulu toga tyngsta lessið. Flokkurin misti á seinasta fólkatingsvalið sín sess, eftir at Óli Breckmann hevði røkt sessin í drúgt áramál, og nú er málið so at vinna hendan aftur.

Fólkaflokslistin til valið er hesin:

Breckmann, Óli, løgtingsmaður, Tórshavn
Bærendsen, Bergur, stjóri, Øravíkarlíð
Djurholm, Bjarni, landsstýrismaður, Hoyvík
Garði, Tummas í, yvirlækni/læknastjóri, Tórshavn
Jensen, Hanna, móðurmálslærari, Norðragøta
Joensen, Kjartan I., løgtingsmaður, Leirvík
Kallsberg, Anfinn, løgtingsmaður, Viðareiði
Keldu, Jógvan við, landsstýrismaður, Klaksvík
Klementsen, Poul, bóndi, Sandur
Lakjuni, Jógvan á, landsstýrismaður, Fuglafjørður
Michelsen, Poul, løgtingsmaður, Tórshavn
Mikkelsen, Jákup, løgtingsmaður, Klaksvík
Mohr, Bjarti, vinnulívsmaður, Tórshavn
Niclasen, Jørgen, løgtingsmaður, Sørvágur
Nolsøe, Óli, sjómaður, Dalur
Olsen, Annika, handilsskúlalærari, Tórshavn
Olsen, Ingi, bankamaður, Vestmanna
Sivertsen, Rúna, blaðfólk, Streymnes
Vestergaard, Jacob, løgreglumaður, Akrar
Viberg, Hjørdis, postkontrollør ,Toftir
Zachariassen, Heðin, løgtingsmaður, Streymnes



*Hjørdis Viberg av Toftum er nýggj á listanum hjá Fólkaflokkinum, sum annars telir hópin av kendum nøvnum innan føroyskan politikk*




## KROSSORÐ




## Vinnari:

***Helena Dam Poulsen***
***Jóansgøta 1, 188 Hoyvík***

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: BUENOS AIRES

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| B | Ø | R | G | E | | S | V | I | M | J | I | N | G | | B |
| A | L | O | E | | A | A | | | I | A | T | A | | F | A |
| R | | | V | E | S | T | U | R | | N | A | K | N | A | R |
| N | Y | K | | T | A | U | R | U | S | | L | K | | | N |
| A | L | E | | I | N | R | I | | A | R | I | A | D | N | A |
| M | U | R | A | N | | N | A | | D | I | A | L | E | K | T |
| A | R | | N | | U | | S | K | A | L | | A | N | I | R |
| T | I | N | D | U | R | | | U | M | L | | N | G | | Ú |
| U | N | D | A | N | T | A | K | | | A | | G | | G | G |
| R | | | L | I | A | N | I | N | | R | O | A | R | | V |
| 402 | E | M | U | | G | N | A | G | S | | P | R | Á | T | I |
| E | L | I | S | | Ø | A | | | N | Ó | A | | | E | N |
| I | N | N | I | | R | R | R | | O | R | K | A | Ð | I | |
| L | A | K | A | | Ð | | | I | R | A | | L | | R | A |
| I | | A | | N | U | M | M | A | R | | G | L | E | R | |
| F | E | R | Ð | A | M | A | N | N | A | S | K | I | P | I | Ð |

## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ...« á bjálvan.

**403**

Loysunarorðið: ..........................................

Navn: ..........................................................

Bústaður: ..................................................

Bygd/býur: ..................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ☐ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ☐ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ☐ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ☐ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ☐ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ☐ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ☐ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***